## Sløktu kyndilin

Hundraðtals fólk vóru møtt á gøtunum í París, tá olympiski kyndilin í gjár skuldi gjøgnum franska høvuðsstaðin. Við tibetanskum fløggum og herrópum vildu tey steðga olympiska loganum, og tvær ferðir noyddist løgreglan at sløkkja kyndilin og goyma hann í einum bussi. Franska løgreglan hevði annars 3.000 mans á staðnum, men tað var eftir øllum at døma ikki nóg mikið.



## Danmark umhugsar boykott

Formaðurin fyri Team Danmark, Carl Holst, umhugsar nú, um hann skal halda seg burtur frá setanini til OL komandi ár. Eitt stig, sum mentamálaráðharrin, Brian Mikkelsen, eisini umhugsar. – Eg eri samdur við mentamálaráðharranum. Eg havi fylgt við gongdini, og her og nú veit eg ikki heilt, hvørja støðu eg skal taka. Men eg fylgi væl við, tí tað eru viðurskifti, sum tala bæði fyri og ímóti, sigur Carl Holst við Ekstra Bladet. Hann heldur tó framvegis, at donsk ítróttafólk eiga at taka lut í leikunum.

# num 100 ár



*Heimskenda myndin frá OL í Mexico í 1968. Tommie Smith og John Carlos rætta svarta nevan upp, eftir at Smith hevur fingið handað gull fyri sigurin í 200 metra renning*
*Mynd: Polfoto/DPA*

Láturligt, men satt! Josef Stalin livdi enn tá. Í 1956 vóru leikirnir hildnir í Melbourne, Australia. Tá var tað Suez-kreppan og uppreisturin í Ungarn, ið kastaðu sínar skuggar yvir leikirnar. Egyptaland, Irak og Libanon noktaðu at luttaka orsaka av Suez-kreppuni, og Holland, Spania og Sveis noktaðu at taka lut, tí Sovjetsamveldið hevði knúst fólkauppreisturin í Ungarn við hernaðarligum valdi. Olympisku leikirnir í Tokio, Japan vórðu boykottaðir av Indonesia og Norður-Korea, og tá bleiv Suður-Afrika stongt úti frá leikunum, orsakað av Apartheid-politikki teirra. Olympiski leikirnir í Mexico City í 1968 vóru hart raktir av mótmælum. 10 dagar áðrenn leikirnir byrjaðu, gingu eitt túsundatal av studentum mótmælisgongu í Mexico City. Mexikanski herurin steðgaði mótmælisgonguni við valdi, og drupu teir 200 studentar. Tveir av amerikonsku rennarunum, teir littu Tommy Smith og John Carlos lótu seg í ein svartan handska, og heilsaðu fjøldini við "Black Power"-heilsuni á sigurspallinum. Teir blivu sendir heim við teirri grundgeving, at politiskar manifesteringar ikki eru loyvdar á einum olympiskum leikvølli, men mótmæli teirra (sí myndin) hevði stóra ávirkan á heimssamfelagið.

### Vanlukkan í 1972

Størsta vanlukkan hendi í 1972, tá leikirnir vóru í Munchen í Vestur-Týsklandi. Palestinski yvirgangsbólkurin "Svarti September" tók 11 ísraelsk ítróttarfólk, sum gíslar, og tey vóru øll myrd. Leikirnir steðgaðu upp, men so bleiv avgerð tikin, um at leikirnir skuldu halda fram. Tá leikirnir vóru í Montreal í Kanada í 1976 boykottaðu 26 afrikonsk lond leikirnar, tí Ný Sæland slapp at taka lut. Afrikanar meintu, at Ný Sæland átti at verið bannað frá at taka lut, tí teir høvdu leikt ein rugby-landsdyst ímóti Suður-Afrika. Tá leikirnir vóru í Moskva í 1980, vóru tað heili 62 lond við USA á odda, sum boykottaðu leikirnar orsaka av sovjetisku innrásini í Afghanistan. Tá leikirnir vóru í Los Angeles í 1984 hevndu kommunistisku londini seg, og øll uttan Rumenia boykottaðu leikirnar. Í 1988 vóru leikirnir í Seoul í Suður-Korea. Norður-Korea vóru firtnir um, at teir ikki vóru medvertir, og teir bóðu onnur lond boykotta leikirnar. Men tað gjørdist bara Kuba og Ethiopia, sum stuðlaðu Norður-Korea. Leikirnir í Barcelona vóru sera væleydnaðir, og øll lond tóku lut tá. Katalanska flaggið var at síggja alla staðni í Barcelona, og Juan Carlos kongur heilsaði fjøldini á katalanskum máli. Ein bumba brast við leikirnar í Atlanta, USA í 1996, men annars tóku øll lond lut. Olympisku leikirnir í Sidney, Avstralia verða mettir at verða teir bestu nakrantíð. Leikirnir í Athen, Grikkalandi í 2004 gingu eisini væl. Men hesar síðstu vikurnar hava boðað frá, at stórur vandi er fyri, at olympisku leikirnir í Beijing ikki verða millum teir bestu og væleydnaðu. Tibetanarar og stuðlar teirra hava sanniliga fingið staðfest sína støðu síðstu vikurnar, og fara at gera tað enn meiri, sum leikirnir í Beijing nærkast.